Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Eyðdis Hartmann Niclasen, landsstýriskvinna í heilsu- og orkumálum

Evni: Dialysa á Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Spurningar:

1. Hevur landsstýriskvinnan politiskan vilja at seta dialysuviðgerð í verk á Klaksvíkar Sjúkrahúsi?
2. Um ja, nær verður dialysuviðgerð sett í verk á Klaksvíkar Sjúkrahúsi?
3. Eru viðurskifti á sjúkrahúsinum sjálvum – við støðuni áðrenn dialysa varð sett í verk á Tvøroyri – sum tala fyri, at dialysa skal vera á Suðuroyar Sjúkrahúsi, men ikki á Klaksvíkar Sjúkrahúsi?

Viðmerkingar:
Í Føroyum hava vit trý sjúkrahús, og í løtuni er samfelagsliga rákið tíbetur soleiðis, at heilsutænastur skulu vera í nærumhvørvinum hjá fólki.

Í seinasta samgonguskeiði sóu vit til dømis, at dialysa varð sett í verk á Suðuroyar Sjúkrahúsi, so fólk í Suðuroy við tørvi á dialysuviðgerð ikki longur skuldu noyðast til Havnar at fáa hesa viðgerð.

Somuleiðis varð lógarverk samtykt, sum byggir á, at alsamt fleiri heilsutænastur skulu vera í nærumhvørvinum hjá borgarunum.

Nakað síðan svaraði landsstýriskvinnan einum fyrispurningi, 52-107/2025, sum bygdi víðari á hetta arbeiðið, nevniliga um at seta dialysu í verk á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Tað svarið var í stóran mun ein fíggjarlig útgreining og ein staðfesting av, at landsstýriskvinnan í øllum førum ikki ta løtuna hevði ítøkiligar ætlanir um at seta dialysu í verk á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Tí hesir spurningar um politiska viljan hjá nýggja landsstýriskvinnuni.

Á Løgtingi, 19. juni 2026

Eirikur í Jákupsstovu